ítróttur

Nr. 167 • leygardagur • 3. september 2005 • 79. árgangur • www.sosialurin.fo

# So er Todi í Lille

**Ætlaða skiftið gjørdist av ongum í 2003, men nú Todi aftur er í Lille, er hann til reiðar at geva fronsku heimsstjørnunum ein skarpan gang**

FÓTBÓLTSPRÁT

*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*

**Bethune, Frakland:** Fyri hálvum triðja ári síðani tóktist tað vera veruleiki, at Føroyar skuldu eiga ein spælara í fremstu fronsku fótbóltsdeilini. Lille var felagið, sum sýndi Toda Jónsson stóran áhuga, og tað eydnaðist eisini at koma ásamt við spælaran um persónligu treytirnar í einum sáttmála. Ein sáttmáli, sum tó varð av ongum, tá FCK ikki vildi sleppa spælaranum eins bíliga, sum Lille vildi hava hann fyri.

Saman við restini av føroyska hópinum kom Todi Jónsson so til Lille mikudagin, og tá tosað verður um handilin, sum bleiv av ongum ta ferðina, er tað ikki frítt, at hann hevur hug at iðra seg eitt sindur.

- Tað hevði sjálvandi verið ein spennandi uppliving, um tað kundi latið seg gjørt ta ferðina, men tað er so ikki nakað, sum eg gangi og hugsi um dagliga. Feløgini kundu ikki koma ásamt um treytirnar sínamillum, og sjálvandi var eitt sindur vónsvikin av FCK. Teir vildu jú ikki loyva mær at spæla, og teir vildu heldur ikki loyva mær avstað, so tað var ein heldur keðilig støða at standa í eftir tey fimm-seks árini, sum eg tá hevði verið í felagnum.




*Hóast vónbrotið var stórt, so er kiksaða skiftið ikki nakað, sum Todi hevur hugsað stórvegis um síðani*

### Beinini hava tað gott

Hesa ferð er uppgávan tó øðrvísi. Ein dystur móti einum av teimum heilt stóru fótbóltstjóðunum í heiminum, og í øllum førum ein dystur, sum er størsta avbjóðingin, sum Todi hevur verið við til at lyft á landsliðnum.

- Tað kann mann væl siga. Hatta er helst besta landsliðið, sum vit koma at spæla ímóti, so tað verður ein spennandi uppliving hjá okkum.

*Eru fyrireikingarnar til ein slíkan dyst øðrvísi, enn tær eru, um eitt nú Kypros var mótstøðuliðið?*

- Tað haldi eg ikki. Ein dystur er ein dystur, og fyrireikingarnar eru tær somu. Men hinvegin eru ytru umstøðurnar kanska øðrvísi. Hetta er jú eitt munandi betri lið, og tí eru vónirnar kanska ikki so stórar til okkum, sum tær vóru tað móti Kypros, har fólk høvdu roknað við einum sigri.

Og tá vit at enda spurdu Toda, hvussu beinini, ið so ofta hava argað, høvdu tað, var svarið í øllum førum positivt.

- Eg haldi, at tey hava tað gott. Eg eri í øllum førum til reiðar at spæla við fullari ferð, staðfestir hann.

# Mortan tók møguleikan

**Nógv bendir á, at Mortan úr Hørg fær stórt herðaklapp frá venjarunum eftir frálíka avrikið móti Kypros**

LANDSDYSTUR

*Jákup Mørk/*
*Álvur Haraldsen*

Bethune, Frakland: Í einum dysti, sum helst meira verður mintur fyri vánaliga úrslitið, heldur enn tey - hóast alt - positivu elementini í føroyska spælinum, var Mortan úr Hørg stóra ljóspunktið, tá Føroyar á heimavølli taptu 3-0 fyri Kypros.

Og tað er eisini nógv, sum bendir á, at sumbingurin fær eitt veldugt herðaklapp fyri avrikið ta ferðina. Leikbannið hjá Johan Byrial Hansen hevur so undir øllum umstøðum við sær, at ein nýggjur maður skal setast á høgra bakplássið, og nógv talar fyri, at tað verður Mortan, sum fær hesa uppgávuna. Atli Danielsen er uttan iva eisini eitt alternativ til plássið, men avrikið seinast saman við skjótleikanum hjá Mortani tykjast bera við sær, at tað verður hann, sum fær stóru uppgávuna at halda í teymunum á Thierry Henry, sum helst verður á vinstra veingi í eini franskari 4-3-3 uppstilling. Ein uppstilling, væl kann telja ein miðvøll við Makalele, Vieira og Zidane…

### Tættan miðvøll

Júst sterki franski miðvøllurin ger, at tað væl kann hugsast, at føroyski miðvøllurin verður settir øðrvísi saman, enn hann so oftani fyrr hevur verið. Sæð burturi frá høgra bakplássinum, so gevur restin av verjuni seg meira ella minni sjálva, eins og tað kann roknast við, at Jákup Mikkelsen verður aftur í málinum.

Við einum øðrvísi miðvølli verður tosað um eina formatión, har teir báðir kantarnir verða drignir nærri móti miðjuni, og tí er væl hugsandi, at Rógvi Jacobsen fær uppgávuna vinstru-megin, og at Claus Bech Jørgensen so verður tann meira framrættaði av sentralu monnunum. Hin maðurin mitt fyri verður uttan iva Fróði Benjaminsen, meðan Jákup á Borg so helst fær plássið høgrumegin. Eisini her kann Atli Danielsen vera eitt alternativ, men vit gita, at hann sleppur at byrja á beinkinum hesaferð, eins og Símun Samuelsen, Heðin á Lakjuni og Ingi Højsted helst eisini gera tað. Serliga Inga høvdu nógv roknað við at sæð á vøllinum móti Kypros seinast, men tá hann ikki varð royndur ta ferðina, verður neyvan ráð til eksperimentir av nøkrum slag, nú mótstøðan er so ræðandi sterk.

Og tað merkir so, at talan hóast alt verður um tveir áleyparar, og koma hesir uttan iva at eita Andrew av Fløtum og Todi Jónsson. Her skal Andrew ivaleyst í gamla leiklutin hjá John Petersen, soleiðis at skilja, at hann verður maðurin,s um skal leita langt aftur á vøllin og stuðla miðvøllinum, meðan Todi so er tann, sum bólturin kann stingast til í vónini um, at hann kann renna bæði Thuram og aðrar av.

Tað gevur so fylgjandi uppstilling, sum tó bert skal síggjast sum okkara boð: Jákup Mikkelsen - Mortan úr Hørg, Óli Johannesen, Jón Rói Jacobsen, Súni Olsen - Jákup á Borg, Fróði Benjaminsen, Claus Bech Jørgensen, Rógvi Jacobsen - Andrew av Fløtum, Todi Jónsson.



*Mortan úr Hørg trein við risa-fetum á føroyska landsliðspallin í dystinum móti Kypros. Og nogv bendir á, at sumbingurin fær afturval, tá liðið til Fraklands-dystin skal setast saman*